DAGSINS MEINING

Al Gore ein for›an fyri høgrasnaring

Í gjár kjósa›u amerikanarar sær n‡ggjan forseta. Vali› stó› millum demokratiska Al Gore og republikanska George W. Bush. Stórur spenningur er um hetta ta› mest t‡›andi forsetavali› í USA í næstan hálvthundra› ár. Ikki bert í USA er stórur spenningur. Eisini í okkara egna heimsparti ver›ur fylgt væl vi› valinum, tí úrsliti› kann koma at hava t‡dning fyri Europa eisini, ikki minst á tí trygdarpolitiska økinum. Me›an Al Gore vil halda fram vi› at brúka amerikanskar hermenn, har ta› leikar hart á langt frá amerikanska meginlandinum, vil Bush lata europearar og onnur lond taka sær av "sínum" trupulleikum. Eyglei›arar vilja vera vi›, at vit fara at fáa eitt USA, sum fer at isolera seg meira, kemur Bush til valdi›. Í stríssmálum - eisini í uttanríkispolitikkinum - sum eitt nú kreppuni í Mi›eystri, er væntandi, at Bush fer at vera nógv "har›rendari" og ikki so altráur at brúka orku til at fáa partarnar at semjast vi› samrá›ingarbor›i›.

Fyri vanligar amerikanarar sn‡r vali› seg ikki so nógv um uttanríkispolitikk. Ta› sn‡r segfyrst og fremst um teirra egna heimliga umhvørvi, og her eiga vit ikki at gloyma, at USA fevnir um 50 ymiskar statir, hvør vi› sínum ey›kennum og egna "innanstatspolitikki". Sum dømi kann nevnast, at statirnir í USA á nógvum økjum hava sínar egnu lógir, eitt nú er dey›arevsing galdandi í nøkrum statum, men ikki í ø›rum.

Amerikanarar skulu ikki bert velja ein n‡ggjan forseta. Teir skulu eisini velja umbo› til kongressina og senati›, og haraftrat er guvernørval.

Ta› er okkara vón, at Al Gore vinnur hetta vali›. Saman vi› verandi forseta, Bill Clinton hevur Gore nú í heili 8 ár tryggja› javnan vøkstur í amerikanska búskapinum. Hóast Gore og Clinton ikki hava megna› at liva upp til summi av teimum lyftum givin hava veri› vi› valini eitt nú um størri sosiala trygd og eitt betri heilsuverk, so eru ta› demokratarnir í USA, sum standa fyri flestu av teimum eftir okkara tykki mest grundleggjandi rættindum hjá samfelagsborgarum yvirhøvur. Demokratarnir eru eisini besta bolverki› móti einum høgraráki, sum alla tí›ina lúrir og ikki minst vi› Bush í Hvítu Húsunum.

Ein ávísur vandi er fyri, at Bush kann ver›a valdur nettup tí, at hann líkasum hevur roynt at kamuflera ta›, sum hann og hansara næstu stu›lar veruliga standa fyri, nevniliga ein konservativa høgrasnaring í flestu av lívsins vi›urskiftum. Ein orsøkin til at republikanararnir taptu vi› seinasta val var nevniliga tann, at framstandandi republikanarar vóru so høgravendir, at amerikanska fólki› vendi teimum baki›, tá avtorna›i. Ta› var teimum ovbo›i›. Hvør minnist ikki Gingrish! Ta› er hendaví›gongda høgrapolitikkin, sum Bush roynir at balla inn í meira moderatar vendingar.

NØVN Í VIKUNI

Forma›urin leggur frá sær

Bygdarrá›sforma›urin í Sandavági seinastu tvey valskei›ini, Suni Joensen, stillar ikki upp aftur til kommunuvali› 21. november.

Suni Joensen hevur veri› bygdarrá›sforma›ur í Sandavági tr‡ valskei› í tveimum umførum. Og næstforma›ur hevur hann veri› eitt skei›.

Suni Joensen var› fyrstu fer› valdur í bygdarrá›i› í Sandavági á valinum í 1980. Hann gjørdist tá forma›ur og sat í hesum sessinum ta› valskei›i›. Á valinum í 1988 var› hann aftur valdur í bygdarrá›i›, og var næstforma›ur fram til vali› 1992. Bæ›i í 1992 og í 1996 var› hann aftur valdur og hevur veri› bygdarrá›sforma›ur í Sandavági hesi bæ›i valskei›ini.

Hesi bæ›i seinnu valskei›ini hava veri› sera strævin. Ta› vita øll, sum hava veri› í politikki, ta› veri› seg lands- ella kommunalpolitikki, at nítiárini hava tiki› fast.

Men Sandavágs Kommuna, vi› Suna Joensen vi› st‡risvølin, er sloppin so heilt hampiliga snikkaleys gjøgnum kreppuna, sum var. Í dag er nettoskuldin hjá Sandavágs Kommunu heilt nær »nullinum«. Og ta› er ikki tí at bara er spart, og einki er gjørt í kommununi.

Suni Joensen sigur, at ein orsøk til, at hann gevst nú, er n‡ggja kommunulógin. Hon krevur, at ein kommuna á stødd vi› Sandavágs Kommunu skal hava bygdarrá›sformann í starvi í hvussu er hálva, og helst fulla tí›.

Suni Joensen metir ikki, at hann hevur orku at røkja eina so krevjandi uppgávu umframt sítt borgarliga starv, sum er at vera tannlækni í Sandavági.

Forma›urin í Sørvági leggur eisini frá sær

Petur Kruse, bygdarrá›sforma›ur í Sørvági telist eisini millum teirra, sum ikki stilla upp aftur til vali› hesarfer›.

Petur Kruse er 51 ára gamal, sonur Andrias Vilhelm Kruse av Ei›i og Olivu Katrinu f. Danielsen úr Sørvági. Petur er giftur Biritu Gunnarsdóttur úr Vestmanna. Petur tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1975 og hevur veri› lærari í Mi›vágs/Sandavágsskúla sí›ani 1976. Hann var á árasskei›i á Danmarks Højskole for Legemsøvelser í 1975/76. petur hevur veri› bygdarrá›sforma›ur í Sørvági sí›ani 1993. Petur Kruse hevur skriva› bókina um Sørvágs krikju 1886-1986.

60 ár

Seinasta leygardag fylti kendi útró›rarma›urin Rodmund Joensen úr Sørvági 60 ár. Rodmundur er ein ma›ur sum hevur eina toskatrúgv á, at ta› ber til at brey›fø›a seg av tí sum okkara fongríka hav gevur. Hann kennir hvørt mi› á hansara lei›um, hvørt frávik í rákinum og hann er so royndur sum útró›rarma›ur, at hann kann sanna, at ein vánalig streymloysa kann roynast verri enn ein gó› mysing.

Og hann tr‡r upp á útró›urin í framtí›ini. "Nú eru vi›urskiftini vor›in munandi betri. Vit hava fingi› uppbo›ssølu her vesturi og ta› tekur bert nakrar fáar minuttir at sleppa av vi› fiskin. Fyrr mátti hvør fiskur yvir høvd. Vit kunnu egna nógv nú, í tí tí›ini vit hava vunni› vi› skjótu avrei›ingini. Og so er prísurin frálíkur. Ta› sn‡r seg slett ikki longur um at fáa so stóra nødd sum gjørligt. Ta› lættir, sigur Rodmundur Joensen.

Og Rodmundur tekur ta› meira róligt nú. Hann hevur sey›, so um heysti› kemur líti› burturúr og november hevur vi›ra› illa.

- Men hjá mær eru krøvini ikki so stór, eg eri gamal drongur og eg eigi bátin sjálvur, so ta› leikar ikki so hart á, sigur Rodmundur.

Rodmundur hevur veri› útró›rarma›ur alt lívi›. Hann hevur eitt stutt skifti veri› vi› trolara, men annars hevur hann hildi› seg til húkin undir Føroyum og í Grønlandi vi›.

je

Tøkk

Stóra tøkk kæru tit øll, sum á ymiskan hátt gleddu meg so hjartaliga á 80 ára fø›ingardegnum 25. oktober.

Hansina Mortensen

Sosialurin

Stovna›ur: 1927

Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo

Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Sveinur Tróndarson sveinur@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn

E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta› mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

L‡singar

Freistir:	Tekst‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Fríggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei› stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil sí›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.

Hava ikki fult álit á Joen H. Andreasen

– At gera sorinskrivaran til løgtingsins umbo›smann er ein óheppin byrjan hjá einum so ómetaliga t‡dningarmiklum og stórfingnum stovni, sum løgtingsins umbo›sma›ur er, sigur Gunleivur Dalsgar›, forma›ur í Starvsmannafelagnum

LØGTINGSINS UMBO‹SMA‹UR
Áki Bertholdsen

Joen H.Andreasen, sorinskrivari hevur fingi› eina har›a byrjan í starvinum sum løgtingsins umbo›sma›ur.

Tí nú er landsins størsta fakfelag fari› at sáa iva um álíti› á tí n‡ggja umbo›smanninum.

– Vit ivast í, um hann ver›ur so álitisvekjandi í sínum arbei›i, sum vit halda, at ein stovnur, sum Løgtings Umbo›sma›ur eigur at vera, sigur Gunnleivur Dalsgar›, forma›ur í Starvsmannafelagnum.

Og forma›urin heldur, at hetta er ein ógvuliga óheppin byrjan hjá einum so ómetaliga t‡dningarmiklum og stórfingnum stovni, sum Løgtingsins Umbo›sma›ur er.

Men Gunnleivur Dalsgar› leggur stóran dent á, at hesar atfinningarnar eru ikki vendar ímóti Joen H. Andreasen sjálvum.

– Eg veit veit onki anna›, enn at hann er ein hampama›ur í allar mátar. Men ta› er tann funktión, i› hann er hevur havt í samfelagnum, sum ger, at vit kunnu ikki hava fult álit á honum.

Ta›, sum forma›urin í Starvsmannafelagnum sipar til, er, at ta› er íme›an, Joen H.Andreasen hevur veri› sorinskrivari í Føroyum, at reglur á danska arbei›smarkna›inum eru gjørdar til rættarsi›venju í Føroyum, hóast hesar reglarnar ikki eru galdandi í Føroyum.

Gunnleivur Dalsgar› sigur, at fyri nógvum árum sí›ani var› semja gjørd á danska arbei›smarkna›inum um at innføra arbei›srættin.

– Hetta er ein rættur, sum

Joen H. Andreasen hevur fingi› eina har›a byrjan sum Løgtingsins Umbo›sma›ur, tí nú hevur størsta fakfelagi› í landinum gjørt greitt, at ta› hevur ikki fult álit á honum

hevur endaligu avger›ina tá i› ósemjur stingaseg upp á arbei›smarkna›inum, tí dómar hjá arbei›srættinum kunnu ikki skjótast inn fyri annan rætt.

– Hetta er ein skipan, sum føroysku fakfeløgini hava stríst ímóti vi› hond og fót, tí vit vilja ikki hava hana í Føroyum. Vit vilja var›veita ta skipan sum er. Og ta› er, at taka ósemjur seg upp, skulu vit hava møguleika til at royna tær vi› vanliga rættin, vi› teimum møguleikum sum har eru at skjóta málini inn fyri hægri rætt.

– Men íme›an Joen H.Andreasen hevur veri› sorinskrivri, er hann farin at hyggja eftir ásetingunum á danska arbei›srættinum og er farin at gera tær til rættarsi›venju í Føroyum.

Gunnleivur Dalsgar› sigur, at hetta hevur volt fakfeløgunum stórar trupulleikar.

– Sostatt kunnu vit ikki hava fult álit á manninum, tí ta› er væl hugsandi, at fleiri mál, sum fakfeløg fara at leggja fyri Løgtingsins Umbo›smann, júst fara at snúgva seg um slík vi›urskifti.

– Spurningurin er, hvørja stø›u hann fer at taka í slíkum málum sum Løgtingsins Umbo›sma›ur, tá i› hann, sum sorinskrivari, frammanundan hevur veri› talsma›ur fyri at gera danskar reglar til rættarsi›venju í Føroyum.

– Tá fari eg at ivast í, um hann kann vera so uttanvelta›ur, sum hann eigur at vera,sigur Gunnleivur Dalsgar›. Og avlei›ingin av tí kann eisini skjótt vera, at vit fara at aftra okkum vi› at brúka ein slíkan umbo›smann í tann mun, vit annars høvdu brúkt hann.

Í útvarpinum mánakvøldi› seg›i n‡valdi Umbo›sma›urin, at hann skilti púra onki av atfinngingunum, tí hann helt ikki, at hann, sum dómari, hevur veri› partískur mótvegis fakfeløgunum.

– Ta› hevur onki vi› máli› at gera. Ongin hevur sagt, at hann er partískur. Ta›, sum hetta sn‡r seg um, er, at me›an hann hevur veri› sorinskrivari, hevur hann fer› eftir fer› tiki› prinsippini í danska arbei›srættinum, sum vit ikki vilja vita av, uppí sínar metingar, og gjørt tær til rættarsi›venju í Føroyum. Og ta› hevur volt okkum stórar trupulleikar, sigur Gunnleivur Dalsgar›.

Leggur sjógv ímillum seg og vanliga borgaran

– Løgtingi› kundi havt spurt fakfeløgini, hvørji krøv tey seta til Løgtingsins Umbo›smann, heldur Gunnleivur Dalsgar›, forma›ur í Starvsmannafelagnum

LØGTINGSINS UMBO‹SMA‹R
Áki Bertholdsen

– Ta› er harmiligt, at løgtingi› aftur hesufer› bar seg solei›is at, at enn meiri sjógvur bleiv lagdur ímillum tingi› og vanliga borgaran.

Ta› heldur Gunnleivur Dalsgar›, forma›ur í Starvsmannafelagnum, nú Løgtingi› gjørdi av at seta Jen H. Andreasen í starvs sum løgtingsins umbo›smann.

Hann finst at mannagongdini, sum var› brúkt, tá i› umbo›sma›urin var› valdur.

Starvsmannafelagi› hevur alment í brævi til Løgtingi› f‡lst á, at løgtingi› velur ein umbo›smann, sum er 67 ára gamal, samstundis, sum øll onnur alment sett, mugu leggja frá sær, tá i› tey eru 67 ár.

Afturímóti hevur løgtingsforma›urin, Finnbogi Ísakson, ført fram, at talan er ikki um eitt starv, men um eitt val. Og tá i› fólk ver›a vald, er onki aldursmark uppeftir, hvørki í politikki, ella í a›rar mátar.

Leggur sjógv ímillum

Gunnleivur Dalsgar› sigur, at hann veit val, at løgtingsforma›urin hevur rætt sum so.

– Men ta›, sum er ógvuliga er ódámligt, er, at løgtingi› meiri og meiri leggur sjógv ímillum seg sjálvan og vanliga borgaran.

– Sostatt upphevjar Løgtingi› seg til naka› serligt, sum er omanfyri vanliga



– Ta› er ógvuliga óheppi›, at Løgtingi› aftur einafer› skuldi velja at provokera vanliga borgaran, heldur Gunnleivur Dalsgar›, forma›ur í starvsmannafelagnum

fólki› og ta› haldi eg er ógvuliga ódámligt.

Eitt anna› dømi er, at løgtingi› herfyri játta›i sær sjálvum eina stóra lønarhækking, uttan at nakar kundi leggja seg út í ta›.

– Eg veit, at løgtingi› hevur buktina og bá›ar endarnar, tí ta› er okkara lóggevandi ting. Men ta› er langt úti, at ta› fer› eftir fer› skal provokera vanliga borgaran vi› at hevja seg upp um fjøldina og gera seg til naka› serligt, sigur Gunnleivur Dalsgar›.

Hann heldur, at ta› var ikki meiri enn rímiligt, enn at Løgtingi› sjálvt gav seg undir tær somu ásetingar, sum eru galdandi fyri vanliga borgaran.

Kundu spurt seg fyri

Hann er grei›ur yvir, at ta› eru ikki fakfeløgini, sum skulu seta Løgtingsins Umbo›smann.

– Men hvat gjørdi ta›, sum Løgtingi› spurdi seg fyri hjá fakfeløgunum um, hvørji krøv tey seta til ein slíkan stovn. Hev›i Løgtingi› gjørt ta›, hev›i ta› heilt greitt fingi› at vita, at, at okkara meting eru fólk ógegni›, sum hava veri› kn‡tt at føroysku rættarskipanini.

Gunnleivur Dalsgar› heldur, at ta› rættast hev›i veri› at valt ein umbo›smann uttan ífrá, sum ikki hevur havt tilkn‡ti til føroysku rættarskipanini, men sum kortini hevur royndir, so at hann kundi ført naka› n‡tt vi› sær inn í føroyska umsiting.

– Hann skuldi í hvussu so er veri› eitt óskriva› bla› í føroysku rættarskipanini, sigur forma›urin í Starvsmannafelagnum.

Annars tekur hann fult undir vi›, at vit fáa Løgtingsins Umbo›smann.

– Men ta› hevur stóran t‡dning, at byrjanin er l‡taleys, og hetta var ein óheppin byrjan, leggur hann afturat.

Fakfeløgini seta trygdina hjá sínum egnu í vanda

Aftursvar til Jørgen Niclasen í Sosialinum leygardagin 4. november

Tey fyrstu árini, sáttmálar vóru ímillum fakfeløgini og Fíggjarmálast‡ri› (tá undir heitinum Føroya Landsst‡ri), um Vaktar- og Bjargingarskipini, var ta› solei›is, at fakfeløgini mettu seg í sáttmálatrætum, ikki at hava verkfalsætt tá i› ta› snú›i seg um bjarging. Ta› hendi eisini, at eitt fakfelag var í verkfalli og nokta›i sínum limum at luttaka í tænastu vi› vaktarskipunum, men bjarging var tó undantikin.

Tá bo›a›i landsst‡ri› frá, at um feløgini l‡stu verkfall fyri sínar limir, so skuldu tey eisini í verkfall, fyri tann partin, i› var bjarging. Sí›an tá hevur Landsst‡ri› onganti› bori› upp á mál, um at fáa bjarging undantikna verkfallsstø›u.

Um Fiskimálará›harrin Jørgin Niclasen, serliga harmast um, at BRIMIL ikki er tøkur til bjargingartænastu, og bi›ur um at fáa serstø›u fyri bjarging so kann hann bi›ja um ta›, men ta› hevur als ikki veri› upp á tal, og bólturin liggur hjá Fíggjarmálast‡rinum.

Um Fiskimálará›harrin ivast í, um stø›an veruliga er so sum sagt frá omanfyri, so kann hann spyrja sínar næstu embætismenn, nevniliga Kaj P. Mortensen, a›alstjóra og Elmar Højgaard, fyribils lei›ara á Fiskivei›ueftirlitinum, tí teir vóru tá ávikavist skipari og st‡rima›ur vi› Tjaldrinum.

Ellintur Abrahamsen
forma›ur